


*Nr. 17* **16. august 2020** *80. árg.*

# Bið størri bønir

*„Tit girnast og hava ikki … av tí at tit biðja ikki.“ Ják. 4,2.*

Hvussu stór er tín orka, og hvussu stórt er títt áhaldni, tá ið tað ræður um bøn?

Tá ið Elia segði við Elisa: „Sig, hvat tú vilt hava meg at gera fyri teg, áðrenn eg verði tikin burt frá tær!“ svaraði Elisa: „Lat tvífaldan part av anda tínum falla á meg!“ (2. Kong. 2,9) V.D.

Summi okkara høvdu verið skelkað av svari hansara og høvdu hildið hann verið erpnan og hugmóðigan og sagt: „Tú skuldi eyðmýkt teg og verið takksamur fyri tey forrættindi, sum tú hevur at sleppa at tæna einum so stórum profeti sum Elia, og tú átti at hildið teg verið hepnan, um Gud loyvir tær at halda á við hansara tænastu. Men Elisa var ikki ræddur ella lítillátin, og Elia gjørdist ikki firtin. Hvussu endaði so alt?

Elisa fekk sín tvífalda part og endaði við at gera dupult so mong undurverk sum Elia. Tá ið tú biður, sigur Gud ikki: „Lat tína umbøn vera rímiliga og lagaliga.“ Hann vil hava teg at biðja til „tann Gud, sum gevur øllum gjarna og uttan átalur.“ Ják.1,5.

Sum hetta er eitt stórt lyfti: „Heit á meg, og eg gevi tær heidningafólk í arv og í ogn jarðarríkið alt.“ Sálm. 2,8 Avmarka ikki Gud! Hugsa um hetta: Um Hann er villigur at geva tær „tjóðirnar í arv“, so vil Hann púra vist frelsa tíni kæru, grøða kropp tín, og geva tær tað starvið, tann bústaðin ella tað sambandið, tú hevur biðið um. Jesus segði: „… hvat tit so biðja í navni mínum, tað skal eg gera…“ (Jóh. 14,13).

Bara tvær ferðir í Skriftini lesa vit um, at onkur hevur sagt okkurt, sum fekk Jesus at undrast. Í báðum førum var tað ein

sýning av treytaleysari, heilhugaðari trúgv hjá einum heidningi – sum tey religiøsu hildu, ongan rætt hava til Guds undur.

So orðið til tín í dag er: Bið størri bønir!

*„… et Ord til Dagen“ - Effie Campbell* umsetti.

# Hundarnir?

Ein maður talaði um ikki at synda upp á náðina. Jesus hevur keypt okkum so dýrt. Um vit rættiliga seta okkum niður at hugsa um, hvat ið hann mátti fara ígjøgnum fyri at keypa okkum aftur inn í Himmalin, so høvdu vit ikki traðkað hansara dýra frelsuverk so undir fótum. Hann var illa hagreiddur og píndur, og harafturat bar hann eina tunga byrði á bakinum, nevniliga allar heimsins syndir, sum eru gjørdar upp gjøgnum tíðirnar hjá øllum ættarliðum. Vit hava ikki tað rætta sinnalagið, um vit hugsa: ja, nú eri eg frelstur, og nú kann eg liva, sum mær líkar. Tá synda vit upp á náðina, og tað gongur ikki.

So las maðurin eitt petti úr síðsta kapitli í Bíbliuni: „Fyri uttan eru hundarnir og gandakallarnir og horkallarnir og manndráparararnir og skurðgudadýrkararnir og hvør tann, sum elskar og fer við lygn.“ Opb. 22,15. Hetta eru tey, sum ikki sleppa inn í Tað nýggja Jerusalem. Les allan 21. og 22. kapittul, har fært tú eina grundiga frágreiðing um nýggja Jerusalem.

Men latið okkum fara aftur til skriftstaðið. Hundarnir eru teir, sum fyrstir eru nevndir burtur úr syndahópinum. Hvørjir eru so hundarnir? Pætur kemur inn á tað í 2. Pæt. 2,22: „Tað hevur gingist teimum eftir hinum sanna orðtakinum: „Hundur vendir aftur til spýggju sína, og tvigin súgv til at velta sær í skarni.“ Tað meinast við, at fólk, sum eru vorðin frelst, fara út aftur í heimin og liva á sama hátt, sum tey gjørdu frammanundan. Men Jesus biður í høvuðsprestabønini: „Heimurin hevur hatað teir, av tí at teir ikki eru av heiminum, eins og eg ikki eri av heiminum.“ Jóh. 17,14. Vit liva í heiminum, men eru ikki av honum. Tað ber ikki til at standa við einum beini í hvørjum leiri, so detta vit niðurímillum. Vit eru kallað at vera ljós og salt í hesum heimi. Hetta lunkaða vil Jesus ikki hava. Tá lovar hann at spýggja okkum út úr munni sínum. Opb. 3,16.

*Effie Campbell.*

# Tvey endatekn

Hin ungi jødin, Dánjal, varð herleiddur til Bábylon, tá ið Gud fyri uml. 2.600 árum síðani vísti honum, hvat ið fer at henda í síðstu tíð jarðarinnar. Hann fekk nógv at vita og skrivaði tað niður í tað, vit í dag kalla Dánjals bók.

Millum annað sá hann tvey endatekn, sum skulu peika okkum á, nær heimsins endi er nær. Hesi eru teknini:

**1.** Mong fara at FERÐAST runt um í verðini, og

**2.** KUNNLEIKIN skal verða stórur.

Um vit googla fyri at vita, hvussu skjótt kunnleikin veksur, so síggja vit, at í 1900-talinum gjørdist hann dupult so stórur hvørt 100. ár. Í dag verður kunnleikin dupult so stórur eftir 13 mánaðum.

Kunnleikin er UNDURFULLUR, tá ið hann verður brúktur til gagns fyri menniskju, djór og náttúru, men hann verður ÓHUGNALIGUR, tá ið menniskju ikki longur kunnu stýra honum – ella við vilja brúka hann í tænastu hjá hinum ónda.

Fara vit út á flogvallirnar runt um í heiminum, so síggja vit, at teir eru kjokkfullir av fólki. Uttan íhald eru millum 8.000 og 12.000 flogfør í luftini samdøgrið runt, og 87.000 flogfør flúgva tvørtur um USA hvørt samdøgur, fyri bara at nevna nøkur fá tøl, sum vísa á ein ótrúligan ferðingarhug.

Um vit hyggja í Bíbliuna „Hverdagsdansk“ og blaða upp á Daniel 12,4 stendur: „Når du er færdig med at nedskrive denne beretning, Daniel, skal du forsegle bogen, indtil tiden er inde. Mange vil rejse rundt i verden, og kundskaben vil blive stor.“ Tað sama stendur í tveimum ymiskum enskum bíblium, sum eg eigi, meðan einki um ferðingarhug stendur í teimum føroysku bíbliunum. Dánjal fær boð um at innsigla bókina, til tað líður at endanum, tá skulu fólk skilja, hvat ið hetta snýr seg um.

Tá ið lærusveinurin Jóhannes var fangi á oynni Patmos, gav Gud honum nágreiniligar upplýsingar um endatíðina og trongdartíðina. Dánjal málber seg soleiðis um hetta í Dán. 12,1:… „tá verða tíðir so trongar, at eingin veit um tílíkt, alt meðan menn hava verið á fold. Men á teirri stund skal fólk títt bjargast, allir teir sum skrivaðir eru í bókini.“

Latið okkum ikki falla í fátt av heimsins hendingum, sum rulla inn yvir okkum á skíggjanum samdøgrið á tamb. Tí Jesus sigur, at í heiminum hava vit ófrið, men í honum hava vit frið, og hann sigur eisini: „Fylgið mær.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Er glatanin sett úr gildi?

Summi trúgvandi fólk í Noregi og aðrastaðni stíga brádliga fram og siga, at glatanin er sett úr gildi. Hví skulu vit reka missión, um glatanin er avlýst? So hevur Jesus útstaðið svára líðing og er deyður til einkis.

Jesus talar sjálvur um glatanina í Jóhs. 3,16. Her tosar hann bæði um ævigt lív og glatan. Bíblian lærir, at tað eru tvær útgongdir út úr hesum lívi, og tí er alneyðugt at reka missión. Jesus legði dent á tað og segði: „Hesi skulu fara burtur til æviga revsing, men hini rættvísu til ævigt lív.“ Matt. 25,46.

Í 1950-árunum talaði Ole Hallesby professari í norska útvarpinum, og tað elvdi til hitt sonevnda „helvitis kjaki“ í Noregi. Kristian Schjelderup bispur studlaði Hallesby. Eftir hetta hoyrdist minni og minni til evnið. Vit standa í vanda fyri at ofra sannleikan í ræðslu fyri at gerast illa umtókt. Jesus setti ikki helviti úr gildi, men hann hótti heldur ongan við helviti.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit síggja meir og meir, hvussu apokalyptiskar tíðir nærkast. Tá ið tað rættiliga smellur, fara kirkjur og missiónshús at verða kjokkfull. Vit koma at fáa „hjálp“ frá vanlukkum, av tí at Bíblian øll árini hevur tosað um hópoyðingarvápn. Fyrr flentu fólk at teimum ymisku skriftstøðunum og søgdu, at hatta var fjas og tvætl. Men láturin er tagnaður so líðandi. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 23. aug. | Tekstur: Matt. 17,1-13 | bíbliuorð: Matt. 17,5b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen, á Gøtuteigi 8, 520 Leirvík.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 18* **30. august 2020** **80. árg.**

# Fylling tíðarinnar er runnin upp og kemur at renna upp

Vit vóru í kirkju í Nordby á Fanø, og har sungu vit ein sálm, sum H. A. Timm hevur skrivað í 1834. Eitt vers ljóðar soleiðis:

*Tidens Fylde ER oprundet,*
*hvad Gud loved, ER ALT sket:*
*Ham, de søgte, Han ER fundet,*
*Verden HAR sin Frelser set;*
*hen til Ham de fromme gik,*
*øste Nådens Læskedrik,*
*vidned årle, vidned silde:*
*Jesus Krist er Livsens Kilde!*

H. A. Timm, sum yrkti sálmin í 1834, kundi longu tá staðfesta, at ALT tað, sum Gud frammanundan hevði boðað um heimsins Frelsara, ER gingið út. Á, sum hetta er ein deilig málbering, at vit kunnu oysa av NÅDENS LÆSKEDRIK. Men nú skriva vit 2020, og í tey farnu 186 árini eru nógvir aðrir profetiir gingnir út, júst soleiðis sum Gud hevði lovað.

Eg trúgvi, at týðiligasta teknið og fyriboðanin síðani 1834 er heimkoma jødanna og Ísraels endurreisn 14. mai 1948.

Sjálvt um menn tóku undir við hesum, so kom avgerðin frá HÆGSTA STAÐI. Gud hevði fyri uml. 2.780 árum síðani sagt frá tí gjøgnum Ámos profet 9,14-15: „Tá skal Eg venda lagnu fólks Míns; teir skulu byggja upp aftur býirnar, sum lagdir eru í oyði, og búgva har, planta víngarðar og drekka vínið úr teimum, dýrka urtagarðar og eta ávøkst teirra. Eg skal planta tey í landi

teirra, og aldri aftur skulu tey verða rykt upp úr landi sínum, sum Eg havi givið teimum – sigur Harrin Gud tín.“ V.D.

Sanniliga: Fylling tíðarinnar ER upprunnin. Tað, sum Gud hevur lovað, ER alt samalt hent. Tað, sum profeturin boðaði, ER hent. Verðin hevur sæð Gud Ísraels. Guds profetisku orð standa í bíðirað at ganga út. Jesus kemur skjótt, og Hann skal verða fagnaður. Amen!

*Effie Campbell* umsetti.

# Í heiminum, men ikki av heiminum

Jesus hevur kallað okkum at liva her og nú. Í heiminum, men ikki av heiminum. Hann hevur kallað okkum at reisast fyri tí, sum vit trúgva á.

Tann, sum trýr á Jesus, kemur at liva eitt øðrvísi lív. Okkara uppgáva er at siga øðrum, hvat ið Jesus hevur gjørt fyri okkum. Tá ið vit byrja við Gudi, fáa vit røttu áskoðanina á alt annað í verðini. Eg trúgvi, at Jesus kallar okkum at reisast við frímóði.

Dánjal kom inn í Bábylon og gjørdi seg kendan við umstøðurnar. Hann hugsaði: „Eg eri í hesum býnum, men ikki av honum. Hann fekk boð um at gloyma alt tað, sum hann áður hevði lært. Hann skuldi læra seg eitt nýtt mál, eina nýggja mentan og ogna sær nýggjan kunnleika. Kringumstøðurnar ætlaðu at programmera hann av nýggjum.

Men Dánjal tók eina avgerð. Hann valdi at vera á hesum staði, men ikki at vera ein partur av tí, sum hesin býur stóð fyri. Tey flestu gera síni val á ungum árum. Dánjal er langt heimanífrá, men andaliga stendur hann ovarlaga. Hann vágaði at standa á egnum beinum.

Beinanvegin, tá ið Dánjal hevði tikið eina avgerð, kom signing Guds yvir hann. Gud leitar eftir fólki, sum eru djørv og reisast og gera av at taka undir við orði hansara fult út. Tað er bara ein avgerð millum teg og Guds ríku signing yvir lív títt. Dánjal segði nei at eta matin, sum fyrst var ofraður til avgudarnar. Dánjal og vinmenninir vildu senda út eitt skilligt signal.

Í Jóh. 17 sigur Jesus, at Hann sendir okkum út í heimin. Men vit skulu vera í og ikki av heiminum. Tað merkir, at vit ikki skulu goyma okkum fyri heiminum, men liva í heiminum, men velja at standa føst sum Dánjal.

Tað at vera kristin er at vera øðrvísi. Tað er neyðugt hjá okkum at taka sjálvsvirðingina aftur, og vit mugu tora at gera ein mun. Vit skulu ikki vera ímóti verðini, heldur ikki fyri verðini. Vit skulu vera í, men ikki av verðini.

Gud kallar okkum í dag at taka eina avgerð at fylgja sær.

*Øystein Gjerme - Effie Campbell* umsetti.

# Nøvn Guds, sum lýsa eyðkennir Hansara

Hetta arkið fekk eg á einum AGLOW fundi fyri árum síðani:

1. **El Elyon:** Hin hægsti, hann, sum stýrir yvir og eigur himmal og jørð, ábyrgda-havari. (1. Mós. 14,18, 2. Sám. 22,14).
2. **El Shaddai:** Hin almáttugi, hann, sum uttan íhald gevur føðslu til síni børn og møtir teirra tørvum. (1. Mós. 17,1).
3. **Yahweh:** Harrin ella Jehovah, hann, sum altíð er, hann, sum støðugt er Eg Eri, hann, sum livir. (2. Mós. 3,15, Sálmur 83,19, Es. 26,4).
4. **Elohim:** Gud hin tríeinigi. (1. Mós. 1,26).
5. **Jehovah Shammah:** Harrin er nær. (Es. 48,35).
6. **Jehovah Shalom:** Harrin, friður okkara. (Dóm. 6,24).
7. **Jehovah Jireh:** Harrin, sum syrgir fyri okkum. (1. Mós. 22,14).
8. **Jehovah Nissi:** Harrin, merki okkara og sigur. (2. Mós. 17,15).
9. **Jehovah Tsidkenu:** Harrin, okkara rættvísi. (Jer. 23).
10. **Jehovah Rapha:** Harrin, sum lekir okkum. (2. Mós. 15,26).
11. **Jehovah Ra ah (Ro-hi):** Harrin, hirði okkara. (Sálmur 23,1).
12. **Jehovah Mekadish-ke:** Harrin, sum heilagger. (2. Mós. 31,13).
13. **Jehovah Yasha-gaal:** Harrin, frelsarin og endurloysarin (Es. 49,26, 60,16).
14. **Adonai:** Harrin mín (1. Mós. 15,2, 5. Mós. 9,26, Sálmur 25,16).
15. **Tsur:** Klettur (Es. 44,8).

# Vandamikil tónleikur

Majbritt Suares var gestur á Visjon Norge. Har greiddi hon millum annað frá dóttur síni, sum fyri árum síðani hevði havt ein stóran trupulleika.

Dóttirin búði heima, hon hevði kamar niðri í kjallaranum. Hon spældi nógvan sovorðnan tónleik, sum verður kallaður sataniskur tónleikur. Hon gekk ógvuliga høgt upp í hetta og hevði eina stóra plakat av einum av hesum sangarunum á vegginum. Plakatin var ógvuliga svørt, og hon mest sum tilbað henda sangaran.

„Eg mátti fara oman í kjallaran at vekja dóttir mína viðhvørt," segði Majbritt, „tá merkti eg ein kaldan gjósur koma móti mær í trappunum. Tá ið hetta hevði hent meg nakrar ferðir, segði eg við dóttrina: „Handa plakatin SKAL niður av vegginum. Eg vil ikki hava slíkt undir mínum taki." Dóttirin mótmælti ikki, og saman tóku tær plakatina niður. Vit rukkaðu hana saman og blakaðu hana inn í opna eldstaðin. Tá hoyrdist eitt andskræmiligt ýl, og kettan bleiv púra svøk. Hon fór við nógvari ferð og rendi høvdið inn í veggin. Men so bleiv kvirt, og óhugnaligi gjósturin hvarv med alla.

Ja, myrkursins kreftir eru ein veruleiki. Hetta er ikki at spæla við.

*Effie Campbell.*

---

Vit eru kallað at boða Guds náði evangelium og ikki lógina. Vit mugu flyta prædikustólin frá Sinai til Golgata, soleiðis at vit byggja boðanina á náðina og ikki lógina. Uttan fyri eina kirkju í USA stendur hetta skeltið: „Alt er fyrigivið. Vælkomin heim!"

---

Peningur er sum saltvatn. Jú meir tú drekkur, tystari gerst tú.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 30. aug | Tekstur: Luk. 8,22-25 | bíbliuorð: Luk. 8,25b |
| 6. sept. | Tekstur: Jóh. 1,18b; 11,3-4 + 17-44 | bíbliuorð: Jóh. 11,25 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen, á Gøtuteigi 8, 520 Leirvík.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74